NAMMCO:

# Nýggj stovnsmeting av grindahvalum

**Árligi ársfundurin hjá NAMMCO hevur verið í Tromsø í vikuni, har Kate Sanderson deildarstjóri í Uttanríkisráðnum umboðaði Føroyar. Á ársfundinum viðgjørdu limalondini seinastu ráðgeving frá NAMMCO vísindanevndini um viðkomandi hvala- og kópastovnar**



HVALAVEIÐA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í ár fegnaðust limalondini um, at útlit eru fyri, at bæði hvíthvala- (beluga) og náhvalastovnarnir við Grønland aftur fara at menna seg, m.a. tí at Grønland hevur sett eina nýggja kvotuskipan í verk, ið fylgir tilmælum frá vísindanevndini. Undanfarnu árini hevur NAMMCO gjørt vart við, at stig eiga at vera tikin til at tryggja, at veiðan í Grønlandi kemur á eitt burðardygt støði.

Í 2007 samskipaði NAMMCO umfatandi hvalateljingarnar í Norðuratlantshavinum. Ein nýggj stovnsmeting av grindahvalum byggir á hesar hvalateljingar, og stovnsmetingin verður viðgjørd í serligum arbeiðsbólki í oktober og í NAMMCO vísindanevndini komandi vár 2010.

Á NAMMCO fundinum var semja um at seta eitt størri arbeiði í gongd til at samanbera ymsar frymlar fyri at kanna sambondini millum havsúgdjór og fisk í vistskipanini, soleiðis at vitan á økinum kann mennast. Enn er trupult at gera neyvar niðurstøður um, hvussu nógvan fisk hvalir og kópar eta, og NAMMCO fer at raðfesta hetta arbeiðið høgt komandi árini.

Eftir áheitan frá Japan var eisini semja um at biðja NAMMCO samskipa eina meting av avlívingarhættum í japanskari granskingarveiðu eftir stórhvalum. Føroyar hava í hesum sambandi eftirlýst kunning frá Japan um smáhvalaveiðu teirra. Fleiri túsund springarar verða riknir í land í Japan hvørt ár, serliga í japanska býnum Tajii, men lítið er kunnað um, hvussu teir verða avlívaðir. Meira kunning fer vónandi eisini at hava við sær eina menning av royndum og vitan millum Føroyar og Japan.

# Ivast í um pengar eru játtaðir til CTD kanningar

**Tórbjørn Jaocbsen, løgtingsmaður, ivast í, um Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður, hevði neyðugu játtanina til at bjóða fólki ókeypis CTD kanningar og hevur tí reist málið í einum fyrispurningi.**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

-Tá ið landsstýrismaðurin í kunngerð frá 7. september 2009 ásetir, at kanningar fyri CTD-sjúku eru ókeypis í sjúkrahúsverki Føroya, við ávísum lýstum treytum, skal tað tá skiljast soleiðis, at hann í verandi karmi fyri heilsuverki hevur fíggjarligt rúm fyri hesum kanningum?

Soleiðis spyr Tórbjørn Jacobsen. Hann sigur víðari spyrj hann:

- Tá ið vit mega ganga út frá, at landsstýrismaðurin í heilsumálum neyvan hevði skrivað undir kunngerðina um gjald fyri CTD-kanningar, um fíggingin ikki longu var í lagi, hví kom hann tá í fíggjarnevndina, sama dag sum kunngerðin er dagsett, við einum fíggjarnevndarskjali, har heitt verður á nevndina um at játta kr. 900.000,- til hendan bráðkomna trupulleika?

Tórbjørn Jacobsen slær kortini fast, at spyrjarin, og Tjóðveldi annars, av heilum huga taka undir við, at CTD-kanningarnar vera gjørdar.

- Hesum hava vit eisini gjørt landsstýrismanninum greitt longu fyri at fíggjarnevndarskjalið varð latið fíggjarnevnd løgtingsins.

Hann sigur víðari, at fíggjarnevndarskjalið var til viðgerðar í fíggjarnevndini týsdagin 8. september 2009. Sama dagin sum landsstýrismaðurin hevur skrivað undir kunngerðina og, so løgið tað ljóðar – sigur hann - dagin eftir dagsetingina á kunngerðini um ókeypis CTD-kanningarnar.

- Partar av fíggjarnevndini vóru ikki nøgdir við upplýsingarnar í fíggjarnevndarskjalinum og ynsktu, at landsstýrismaðurin kunnaði nevndina meira um hvørji, alternativ vóru til loysnina, sum mælt varð til. Tí varð fíggjarnevndarskjalið ikki avgreitt á fundinum týsdagin í vikuni, og ógreiða er framvegis um, hvørja lagnu hetta skjal fær í nevndini, sigur hann í fyrispurninginum.

- Hinvegin, so tykist landsstýrismaðurin hava greitt fíggingina av málinum á annan hátt, tá ið hann longu hevur ásett í kunngerð, at fólk kunnu fáa ókeypis kanningar fyri CTD-sjúkuna. Spurningarnir verða settir, tá trupult er at skilja mannagongdina í málinum, har fíggjarnevndarskjal og kunngerð eru komin í trol hvørt við annað í málinum, sigur Tórbjørn Jacobsen.




Í samband við at handilin verður **45 ár** mánadagin 14. september 2009, hava vit nú stóra útsølu har ein rúgva av klæðum/vøru verður seld við **45%** í avsláttri

P/F hjá KISSA

TÓRSGØTA · 100 TÓRSHAVN · TEL 31 13 95
HJAKISSA@POST.OLIVANT.FO